umhvørvisstovan

SJÓVAR KOMMUNA
SKÚLAVEGUR 10
490 STRENDUR
FØROYAR

Argir hin 6. september 2016
Málsnr.: 16/00465-10
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ingvard Fjallstein

**Viðvíkjandi: Árinsmeting og góðkenning í sambandi við útfylling norðanfyri Langanes á Strondum**

Sjóvar kommuna, Arthur Johansen, borgarstjóri, sendi hin 17. juni 2016 umsókn um loyvi at fylla grót út á sjógv millum Langanes á Strondum og ætlaðu útfyllingina til vegin frá runtkoyringini við Sjógv til Eysturoyartunnilin. Við umsóknini var ein lýsing av verkætlanini við tekning av eini verkætlan, sum er nakað størri enn tann, søkt verður um.

Talan er um eitt øki, sum er umleið 400 metur norður úr verandi havnarøki við Langanes og 65 metrar úr landi í lidnari hædd (1,5 m). Ætlanin er at gera vinnuøki í norðara parti av økinum og smábátahavn við innsigling við núverandi verjugarð í sunnara parti av økinum

Hin 27. juli 2016 fekk Umhvørvisstovan frágreiðing, sum BIOFAR hevði gjørt: *Umhvørvislýsing av botninum frá Langanesi, inn har tunnilsmunnin er ætlaður at vera.*

**Málsviðgerð**

Sjóvar kommuna hevur søkt um at gera vinnuøki og bátahyl innanfyri Langanes á Strondum við at leggja eina grótfylling og verjugarð út á fjørðin. Sambært §21 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum kunnu verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka náttúru og umhvørvi munandi, ikki setast í verk uttan góðkenning, sum bert kann veitast, um mett er um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi.

Sjóvar kommuna hevur gjørt eina tekniska-fíggjarliga lýsing og eina búlendislýsing av økinum. Í norðara parti av økinum er ætlanin at hava smáídnað, meðan sunnari partur er bátahylur til smábátar. Tó kunnu alibátar og smærri línubátar koma inn til bryggjuna við Langanes. Út frá teknisku lýsingini verður mett, at útfyllingin fer at koma út á umleið 20 metur dýpi (uml. 90 til 120 metur út eftir botni) og fer tí at ávirka eitt botnøki upp á 40.000 til 45.000 $m^2$. Umleið tríggir fjórðingar av botninum í økinum verða lagdir undir grót, meðan seinasti fjórðingurin við bátahyli verður nógv ávirkaður av broyttu umstøðunum.

Búlendislýsingin frá 21. juli 2016 fevnir um 375 metrar norður úr ferguleguni við Langanes og út á 20 metur dýpi ella umleið 145 metrar úr sjóvarmálanum, svarandi til 84.000 $m^2$. Kanningin fór fram 4. og 5. juli 2016.

Í høvuðsheitum er botntilfarið blandaður sandur við einstøkum steinum og klettum. Frá vatnskorpuni og niður á umleið 12 metrar er botnurin klæddur við brúntara, sum festir seg á harða undirlagið. Einstøk sandeygu eru, har tari ikki veksur. Á umleið 10 metur dýpi fækkast brúntarin og botnurin stendur meira berur við sandeygum. Á klettum er skorpukendur reyðtari og ymisk dýr. Sandurin verður fínari í djúpara partinum á økinum.

Kanningin staðfestir 54 djórasløg í 13 høvuðusbólkum; 15 lindýrasløg, 8 ymisk krabbasløg, 7 ymsikar bustmaðkar og 7 fiskasløg v.m.

Úrslitið av kanningunum vísir, at økið kann lýsast við trimum búlendissløgum (habitatum), sum øll eru rættiliga vanlig í Føroyum. Búlendini verða flokkað sum, "Stórtari við reyðtara á nakað vardum kletti", "Klettar við tindadýrum og skorpukendum algum" og "Infralittoral mórukendur sandur".

Skrásettu búðlendini eru vanlig, bæði á Skálafjørðinum og í Føroyum yvirhøvur. Ongi sjáldsom dýr ella tarar vórðu skrásett.

**Viðmerkingar annars**

Umhvørvisstovan gongur út frá, at Friðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin hava givið tilsøgn til verkætlanina sambært Ll. um náttúrufriðing[1]

Økið, har ætlanin er at fylla út, liggur uttanfyri D2-øki í byggisamtyktini fyri Sjóvar kommunu. D2-øki, eru øki, sum eru løgd burturav til havnarendamál, og til virkir sum í dag eru knýtt beinleiðis til økið, eitt nú bátahavn, neyst, bátapláss, bilstøðlar og tílíkt. Bæði tí at fylt verður út á sjógv, og tí at ætlanin at brúka norðara part av økinum til smáídna, sum helst ikki er í samsvari við orðaljóðið í byggisamtyktini fyri økið, verður Sjóvar kommuna biðin um at broyta byggisamtyktina sambært §5, stk. 3 í Ll. um býarskipanir og byggisamtyktir[2], so hon verður í samsvari við veruleikan, og ætlanina at brúka nýggja havnarøkið til smáídna.

Kommunan kann enn ikki upplýsa, hvat virksemið verður á økinum í framtíðini. Um virksemi verður á økinum, sum krevur umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í Ll. um umhvørvisverd[3], skal kommunan tryggja, at ætlaða virksemið hevur fingið umhvørvisgóðkenning, áðrenn byggiloyvi verður givið, sambært Kunngerð um kommunala byggimálsviðgerð[4].

**Avgerð**

Út frá hesum metir Umhvørvisstovan ikki, at ætlaða útfyllingin út á sjógv fer at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvið, og hevur tí, sambært § 21, stk. 4 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum[5] tikið avgerð um, at tað ikki er neyðugt við góðkenning sambært § 21, stk. 1 og tilhoyrandi árinsmeting

---

[1] Løgtingslóg nr. 48 frá 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum
[2] Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir
[3] Løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisverd við seinni broytingum
[4] Kunngerð nr. 57 frá 2001 um kommunala byggimálsviðgerð
[5] Løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum

sambært § 21, stk. 2 í lógini. Sambært §18 í fyrisitingarlógini[6] metir Umhvørvisstovan heldur ikki, at neyðugt er við partshoyring og kæruvegleiðing, tá avgerðin gongur kommununi á møti.

Vinarliga

Ingvard Fjallstein, málsviðgeri

[6] Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg